*1. Hesar skógvarnar hevur Guðrun keypt, hóast hon frammanundan visti, hon ongantíð fer í teir. Teir standa vanliga til pynt og geva íblástur.*

*2. Nýggjasta plaggið hjá Guðruni: Adidas skógvar og Wood Wood skógvar.*

*3. Røvarakeypið hjá Guðruni: Troyggja úr Blákross fyri 10 kr., kjóli frá danska sniðgevanum Mariu Møller, perlubelti úr Jordan og belti frá Tórgerð Suðuroy: - Belti frá Tórgerð Suðuroy var bíligt og er sera vakurt. Tað er stuttligt at finna eitt so kult belti í Føroyum, ið eins væl kundi verið keypt fyri dýrar dómar í París.*

*4. Tveir yndiskjólar hjá Guðruni. Gráa kjólan keypti hon til dópin hjá soninum, og tann ljósareyða kjólan hevur hon keypt í innflytarahandli í Keypmannahavn.*

*5. Yndissniðið hjá Guðruni: - Henda kjólan kann eg bæði brúka til einar sandalur, men somuleiðis til einar slitnar løriftskógvar.*

*6. Taska úr kvalaraslanguskinni, ið Guðrun ofta hevur við sær.*

*7. Taska, Guðrun hevur keypt í endurnýtsluhandli í Keypmannahavn. Honkina hevur Guðrun sjálv gjørt.*

*8. Frakki úr føroyskum skinni frá Guðrun & Guðrun.*

*9. Guðrun heima í hugnaligu stovuni hjá sær í Dalagøtu.*

*10. Hárspenni úr ektaðum silvuri, mamma Guðrun hevur brúkt, tá hon var lítil: - Eg sá tað fyri kortum í einum blaði fyri 1300 kr.*

*11. Guðrun er sum oftast varin við at brúka ov nógvar smykkur. Hetta hálsbandið er sera einkult – eitt 18 karat gull hjarta við einum bummullstráði í.*

*12. Nýggjasta smykkan hjá Guðrun & Guðrun.*

*13. Armband, sonurin hevur gjørt í skúlanum.*

*14. Amulett, Guðrun hevur fingið frá mammuni: - Eg fari at koyra synirnar í amulettina.*

*15. Brosjan hevur nógv at siga fyri Guðruna: - Eg havi fingið hana frá Barbaru á Rógvu. Hvørja ferð eg síggi hana, verði eg í góðum lag.*

*16. 16 ára gamal oyraringur, Guðrun hevur keypt í lestrartíðini í Berlin: - Hann er altíð stuttligur at taka fram.*

*17. Ringur frá H&M*

*18. Perluketa úr innflytarahandli í Keypmannahavn.*


9


6




8

**Serstakt plagg?**
Einar strammar leðurbuksur úr japanskum geitaskinni, eg alt mítt lív havi ynskt mær. Eg fekk fyri kortum ein sniðgeva at gera tær fyri meg. Hon tók mát her og har, so nú havi eg einar bleytar lekrar leðurbuksur, ið eg eri sera glað fyri.

**Hvør hevur havt størsta ávirkan á tín stíl?**
Eg havi roynt meg fram við nógvum ymiskum. At byrja við hugdi eg nógv eftir, hvat Vivienne Westwood gjørdi – hon hevur altíð verið djørv og torað væl. Hetta dámdi mær væl og fekk íblástur haðani. Men nú hugsi eg ikki longur um, hvat hini halda. Nú fari eg einans eftir tí, mær dámar. Og eg vil fegin gjalda eins nógv fyri klæðir frá einum kendum sniðgeva sum frá einum púra ókendum. Eisini dámar mær onkuntíð at lata meg í okkurt plagg, ið tannáringar tora at fara í, og síðan at fáa tað at síggja út til at kosta eina milliún.

**Hvat hevði tú ynskt, tú hevði havt ráð til?**
Ein lekran, ráhvítan, krúllaðan leðurfrakka frá Prada. Men sum heild dugi eg rættiliga væl at finna ymiskt, ið ikki kostar so nógv, men sum allíkavæl er smart og sær út sum ein milliún. Heldur keypi eg dýrar merkjavørur av luktilsi og prýðislutum, eitt nú Dolce & Gabbana.

**Hvussu nógvar pengar brúkar tú til klæðir?**
Tá eg eri á handilsferð, keypi eg klæðir fyri nakrar túsund krónur - góð og dýr klæðir. Fyrr koyrdi eg klæðir burtur í tonsatal og keypti nýtt so hvørt, men nú geri eg ongantíð feilkeyp. Um eg ivist í onkrum, hugsi eg meg um í ein dag, og um eg framvegis vil hava plaggið dagin eftir, keypi eg tað tá.

**Største fyrimynd innan snið?**
Mær dámar væl skógvasniðið hjá Prada. Annars klæða Lisa Bonet og Vanessa Paradis seg væl.

**Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg klára í?**
Dagliga havi eg ikki góða tíð, men um hálvan tíma hvønn morgun. Eg eigi tveir dreingir, ið altíð koma í fyrstu røð, so tá eg skal í onkra veitslu, havi eg heldur ikki meira enn hálvan tíma at gera meg klára í, tí tá skal eg finna barnagentu o.t., so alt gongur við fullari ferð.

**Vakurleikaráð?**
Tað ræður ikki um at yvirklæða seg. Rætta loysnin er ikki at fara og keypa nýggj klæði frá høvur til fót, men heldur at seta røttu klæðini saman. Annars eri eg sjálv stórnýtari av kinnareyða, ið kann brúkast til alt.

**Besta sniðið hjá Guðrun & Guðrun?**
Ein bundin kjóli og eitt belti.

**Hvat hevur tú altíð við tær?**
Eina góða tasku. Serliga brúki eg nógv eina taksu úr ektaðum pytonslanguskinni.